# ÚTVEGAN OG ENDURNÝTSLA AV HJÁLPARTÓLUM



**Uppskot um samskipan millum almanna-, heilsu- og skúlaverk**

**Álit frá samskipanarnevndini**

**oktober 1992**

## Fororð

Landsstýrið setti 20.mars 1990 eina nevnd við umboðum fyri Almannastovuna, sjúkrahúsverkið, skúlaverkið og Hjálpartólamiðstøðina at gera eitt uppskot um samskipan av játtan, útvegan og umsiting av hjálpartólum til brekað.

Við hesum fyriliggur álitið frá nevndini.

Nevndin hevur havt 8 fundir.

Til at lýsa serlig øki hava hesi verið við á fundum: Vígdis Højgård, Leiðari á goymsluni, Randi Petersen, yvirfysioterapeutur á Landssjúkrahúsinum og Høgni Joensen, sjúkrahússtjóri.

Nevndin veitir tøkk til øll, sum hava víst arbeiðinum áhuga og hjálpt til á ymsan hátt.

Ein serlig tøkk til Rådet for tekniske Tiltak for Funksionshemmede í Oslo og Ringkøbings Amts Hjælpemiddelcentral, sum hava latið nevndini kanningar, hagtøl og annað tilfar.

Dánjal Pauli Haraldsen hevur verið formaður og skrivari í nevndini. Frá okt. '91 til okt. '92 hevði Dánjal Pauli farloyvi og var Karin Heinesen í hansara stað hettar tíðarskeið.

Í Havn 2 oktober 1992,

Heri Ellingsgaard
- fyri Sjúkrahúsverkið

Marjun Sigurðsdóttir
- fyri Almannastovuna

Hans Eli Dahl
- fyri Skúlaverkið

Dánjal Pauli Haraldsen
- fyri Hjálpartólamiðstøðina

# Samandráttur

Fyriliggjandi álit er uppskot um, hvussu útveganin og endurnýtslan av hjálpartólum til brekað kann samskipast millum almanna-, heilsu- og skúlaverk.

---

Støðið undir tilmælinum er eitt broytt og væl lýst ábyrgdarbýtið:

---

**Hjálpartól** til einstaklingar verða játtað av Almannastovuni og umsitin av HTM.

**Viðgerðartól** til einstaklingar verða fíggjað og umsitin av sjúkrahúsunum.

**Frálærutól** er eins og nú ábyrgd skúlans. Tó er nevndin ósamd, hvussu teldur til brekaðar skúlanæmingar skulu flokkast.

**Stovnstól**, tvs. tøknilig útgerð til almenna nýtslu á stovnunum verður, eins og nú, útvegað sum innbúgv.

---

Hugtøkini: "**Fyribils**" og "**Varandi**" verða avtikin, í samband við avgerð um játtan. Almannastovun heldur hettar krevur lógarbroyting í forsorgarlógini grein 18 stk. 5.

Almannastovan letur HTM fulltrú at játta hjálpartól eftir nærri ásettum reglum.

Hvørt sjúkrahús tilnevnir ein ábyrgdarpersón og letur høli til eina goymslu. Á goymsluni vera **hjálpartól** latin frá HTM, og **viðgerðartól** latin frá sjúkrahúsunum. Sjúkrahúsini lata HTM tøk hjálpartól til skrásetingar.

Landsstýrið áleggur stovnunum nærri lýsta ábyrgd fyri málsviðgerð og tøkniligum veitingum.

---

1 starv verður normerað á HTM. Játtanin til HTM verður hækkað við 655.000 kr. og játtanin til forsorgarlógina lækkað við somu upphædd. Í sama viðfangi verður ómaksgjaldsskipanina á HTM avtikin.

Bæði Almannastovan og Sjúkrahúsverkið ynskja HTM integreraða í sín bygnað. HTM mælir til at fremja samskipanina fyrst og taka støðu til møguliga bygnaðarbroyting í 1996.

---

Samskipanin fremur setta málsetningin: greitt fíggjar- og uppgávubýti, einføld umsiting, eins tænastustøði og myndugleikar fáa amboð at stýra gongdini innan økið.

Fyriliggjandi uppskot um samskipan rationaliserar útveganina og økir endurnýtsluna til eini 70 - 80 %, svarandi til uml. 5 mió kr./árliga.

Hettar ger, at Almannastovan kann víðka játtanarøkið, nøkta vaksandi tørvin á hjálpartólum, loyva at HTM fær 655.000 kr. av játtanini til forsorgarlógina, uttan at útreiðslurnar hækka, heldur tvørturímóti.

Sjúkrahús, skúlar og røktarstovnar sleppa undan íløgum í hjálpartól til einstaklingar framyvir. Verður skipanin ikki framd, krevjast íløgur í tíðarhóskandi tól, svarandi til nakrar 100.000 kr. árliga.

---

**Nevndin mælir landsstýrinum til at geva álitinum skjóta viðgerð, so samskipanin kann fremjast 1. januar 1993.**

# Innihaldsyvirlit


Inngangur 1

Verandi skipan 3

Vansar við skipanini 5

**Uppskot til samskipan**

Fíggjar- og ábyrgdarbýti 7

Avleiðingar av samskipanini 11

Flyting av tilfeingi 14

Bygnaður 16

Tíðarætlan 17

**Skjøl**

Bókmentir 19

Viðgerðar- og hjálpartól 20

Fíggjarætlan fyri HTM 21

Setningurin hjá nevndini 22

Viðmerkingar Almannastovunnar 23

Viðmerkingar Sjúkrahúsverksins 25

# Inngangur

**Hví hetta nevndararbeiðið**

Síðan fyrst í 70'unum eru tøknilig viðgerðar-, frálæru- og hjálpartól vorðin ein týdningarmikil táttur í samband við medisinska, pædagogiska og sosiala rehabilitering.

Eitt øki í menning

Tøknifrøðiliga menningin, krøv frá brekaðum um normalisering av støðuni, menningin innan ellisrøkt í egnum heimi, fleiri og fleiri gomul brekað, styttri innleggingar á sjúkrahúsum eru viðurskifti, sum hava økt um tørvin.

Almennu útreiðslurnar til hjálpartól eru alsamt vaksandi, og menningin hevur økt um fakligu og umsitingarligu krøvini til starvsfólk, stovnar og myndugleikar sum játta, umsita ella á annan hátt varða av.

Noreg

Formaðurin hevur kannað viðurskiftini í Danmark og Noreg og útvega nevndini rúgvusmikið tilfar. Serliga norðmenn hava gjørt eina útveganarskipan, sum er grundað á nágreiniligar kanningar um tørv, kostnað og gagn.

Í 1989 var 1,4 mia játtað til hjálpartól í Noreg.

Í Noreg hevur gongdin í 80'unum, innan tey sonevndu funktiónshjálpartólini, sum samskipanarnevndin serliga hevur viðgjørt, verið henda:




Tey kropstøttu hjálpartólini: Protesur, brillur, ortopædiskir skógvar og hoyruapparat eru ikki tald við her. Heldur ikki avlamisbilar og umbyggingar.

Almannstovan

Almannastovan yvirtók 1. januar 1988 játtanarmyndugleikan fyri hjálpartól eftir avlamispensiónslógini. Almannastovan hevði áðrenn játtað hjálpartól til fólkapensiónistar.

**Hjálpartólamiðstøðin**

Í Føroyum fingu vit í 1988, sum seinasta norðurland, eina hjálpartólamiðstøð (HTM) við endamálinum:

- við tøkni at bøta um møguleikarnar hjá brekaðum
- at savna serkunnleika og menna tað fakliga støðið í samband við útvegan
- at vera bindilið millum brúkarar, avvarðandi starvsfólk, stovnar og myndugleikar.
- at vera við at umsita íløguna, sum játtandi myndugleikar gera í hjálpartól, við rationellum keypi, goymsluhaldi og endurnýtslu.

**Sektorisering**

Sum aðrar almennar veitingar er ábyrgdin av tekniskum hjálpartólum býtt út til stovnar sum liggja í ymiskum "verkum".

**Norsk kanning**

Í eini norskari kanning frá 1989 var víst á at spjadda fíggjarliga ábyrgdin í sektorar, tá talan er um hjálpartól, elvir til umfatandi skrivstovuveldi og er ein forðing fyri effektivari endurnýtslu.

Í norsku frágreiðingini verður mælt til eina eindarskipan við einum játtandi myndugleika og einum stovni at umsita tólini.

**Ráðstevnan á HTM**

Við íblástri úr hesari kanning skipaði HTM í juni 1989 fyri einari ráðstevnu við umboðum fyri stovnar í almanna-, heilsu- og skúlaverkinum.

Á ráðstevnuni varð staðfest, at tænastustøðið, serliga mótvegis heimabúgvandi, var vorðið tíðarhóskandi. Týðandi vansar við skipanini vórðu tó staðfestir, og umboð fyri allar stovnar mæltu til, at Landsstýrið setti eina nevnd at gera eitt tilmæli um framtíðarskipan í Føroyum.

## Setningurin

20. mars 1990 setti Landsstýrið samskipanarnevndina við hesum setningi: (sí skjal síða 22)

1) Í hvønn mun kann játtanin, útveganin og endurnýtslan av hjálpartólum til brekað samskipast millum heilsu- almanna- og skúlaverk.

2) Uppskotini skulu raðfestast.

3) Fíggjarligu avleiðingarnar vurderast og krøv setast til flyting av tilfeingi millum verk og stovnar.

4) Krøv skulu setast, um mannagongd og lógir skulu broytast.

# Verandi skipan

Tær lógir og rundskriv sum siga nakað um ábyrgd og skyldur viðvíkjandi hjálpar- viðgerðar- og frálærutólum eru:

1) Forsorgarlógin
2) Fólkapensiónslógin
2) Fólkaskúlalógin
3) Sjúkrahúslógin
4) Indenrigsministeriets cirkulære 20.2.1975 nr.21
   om afgrænsing af hjælpemidler og behandlingsredskaber (Bert vegleiðgandi í Føroyum)
5) Álit um Hjálpartólamiðstøð

**Sjúkrahúsini**
Sjúkrahúsini hava mótvegis sínum sjúklingum skyldu at veita **viðgerðartól** og **hjálpartól til fyribilsnýtslu**

Í ivamálum hava sjúkrahúsini og Almannastovan nýtt "afgrænsningscirkuleret" og danska praksis sum vegleiðing.

**Almannastovan**
Við heimild í forsorgarlógini, serliga grein 18.stk.5 og Fólkapensiónslógini gr.14 stk.2, kunnu brekað søkja Almannastovuna um hjálpartól til varandi nýtslu.

**Stovnar**
Hugtakið "Stovnar" verður í álitinum nýtt sum felagsheiti fyri stovnar, hvørs viðskiftafólk eru eldri ella brekað. T.d. røktar-, ellis-, og viðgerðarheim. Men hugsað er eisini um skúlar og barnagarðar, sum varða av brekaðum.

Vanligt hevur verið, at stovnar hava fíggjað hjálpartól, bæði til almenna (generella) nýtslu á stovninum og til einstaklingin, yvir raksturin.

Við tí endamáli at økja endurnýtsluna og geva viðskiftafólki á stovnum somu sømdir sum heimabúgvandi, hevur Almannastovan síðan á heysti 1989 játtað persónlig hjálpartól til einstaklingar á Døgnstovnum innan Almannaverkið.

**Fólkaskúlin/kommunurnar**
Til næmingar í skúlanum verður tað mett sum skúlans uppgáva at syrgja fyri frálæru- og hjálpartólum innan skúlagátt. Talan er sostatt um eina kommunala útreiðslu. Fólkaskúlalógini § 25 áleggur skúlunum at lata næmingunum øll neyðug undirvísingarambоð.

**Hjálpartólamiðstøðin**
HTM ráðgevur í hjálpartólaspurningum og útvegar hjálpartól fyri rokning hjá tí stovni/myndugleika sum hevur

ábyrgdina. Hjálpartól, sum Almannastovan játtar til varandi nýtslu verða afturborin til HTM og endurnýtt.

Almannastovan

**Útveganin seinastu árini**
Virðið av hjálpartólum til varandi nýtslu, játtað av almannastovuni og útflýggjað av HTM, sæst á hesi talvu.(1000.kr)




Trífalding eftir 4 árum

Á talvuni sæst at talan er um eina nærum trífalding av nýtsluni av hjálpartólum innan 4 ár:

> Almannastovan játtaði í 1991 hjálpartól fyri eitt virðið uppá 5,5 mió í móti 2 mió. í 1988.

Eisini sæst, at endurnýtslan alsamt økist, og umboðar í 1991 eitt virðið uppá 2,5 mió ella 45 %.

Hóast stóra vøksturin í nýtsluni, svarandi til 3,5 mió, er útreiðslan á forsorgarlógini hesi 4 árini bert økt við 1 mió.

Sjúkrahúsini

Sjúkrahúsini hava ikki greinað útreiðslur til hjálpar- og viðgerðartól fyri seg, men talan er helst um einar 100 til 200.000 kr. árliga.

Kommunurnar

Nevndin hevur ikki útvegað nágreinilig hagtøl yvir útreiðslur, sum kommunurnar hava til hjálpartól og frálærutól til brekað, - men hildið verður, at talan eisini her er um nakrar hundrað túsund krónur árliga.

# Vansar við skipanini

## Sjúkrahúsini

Sjúkrahúsini hava ikki í nóg stóran mun skipað innkeyps-, goymslu- og viðlíkahaldsvirksemið. Úrslitið er, at sjúkrahúsini ikki altíð hava rætta tólið at lata sjúklingum, tá teir verða útskrivaðir.

Fyri sjúklingar er tað ikki lætt at fata og fyri fakfólk trupult, at tað í hvørjum føri skulu takast dagar ímillum, um eitt tól er til fyribils ella til varandi nýtslu.

Hevur ein sjúklingur fingið tól frá sjúkrahúsunum fyribils, so skal hann, um tørvurin verður varandi, í gjøgnum nýggja tillaging, lata tólið inn aftur á sjúkrahúsið fyri at fáa samsvarandi tól útflýggjað frá HTM, sum Almannastovan møguliga játtar eftir umsókn.

Sjúkrahúsini lána viðgerðartól til sjúklingar í samband við útskriving. Í øðrum førum verður umsókn send Almannastovuni, um talan er um eina varandi loysn.

Ivi er ofta um, hvør hevur ábyrgdina mótvegis heimabúgvandi, sum hava fingið ordinerað viðgerðartól frá egnum lækna.

## Skúlarnir

1) Nær er talan um hjálpartól, sum Almannastovan játtar og nær er tað kommunan ?

2) Nær er eitt tól hjálpartól og nær er tað frálærutól ? Serliga trupult hevur verið við teldutøknini, har sama tól bæði kann vera hjálpar- og frálærutól samstundis.

3) Í førum, tá talan er um tól, sum skúlin skal útvega, eru summi av hesum so kostnaðarmikil at byrðan hjá einari lítlari kommunu verður órímuliga tung - og tólini ofta als ikki útvegað.

## Almannastovan og HTM

Á HTM stendst umfatandi málsviðgerð av at greiða fløkta fíggjarbýtið.

Sjúkrahúsini ásanna, at Almannastovan og HTM í stóran mun átaka sær veitingar og útreiðslur, sum formliga eru ábyrgd sjúkrahúsverksins.

Á HTM er ofta ógjørligt at staðfesta, hvør eigur tey tól, ið eru afturborin.

**Avmarkingartrupulleikar**
Yvirlitið gevur eina mynd av fløkta fíggarbýtinum og avmarkingarspurningunum, sum standast av at fleiri myndugleikar hava skyldur á sama øki.

A = Almannastovan
S = Sjúkrahúsini
ST = Stovnarnir
K = Kommunurnar

| | | Tann brekaði kann vera<br>Heima | á<br>sj.húsi | í<br>skúla | á<br>stovni |
|---|---|---|---|---|---|
| Hjálpartól | Fyribils | S | S | K/S | ST/S |
| | Varandi | A | | K/A | A/ST |
| Viðgerðar-tól | Fyribils | S/A | S | K/S | S/ST |
| | Varandi | A/S | | K/A/S | A/ST |
| Frálærutól | | K/A | K | K | ST/A |

**Niðurstøða**
Núverandi skipan og fíggjarliga ábyrgdarbýtið er í gerandisdegnum torskilt at umsita.

Umfatandi fyrisitingarligar mannagongdir standast á stovnum í royndini at avmarka ábyrgdina sínámillum.

Í ivamálum verður ábyrgdin á skúlum, stovnum og á sjúkrahúsum flutt til Almannastovuna og HTM.

Sjúk og brekað fáa ymiskar sømdir, alt eftir hvør stovnur varar av teimum.

Skipanin forðar fyri effektivari endurnýtslu, soleiðis at tól standa óbrúkt á sjúkrahúsum og stovnum og verða ótíðarhóskandi, áðrenn tey eru uppslitin.

## Uppskot til samskipan

### Málsetningur

Fyriliggjandi uppskot um samskipan av útveganini og endurnýtsluni hevur sum endamál:

- at gera eitt greitt fíggjar- og ábyrgdarbýti, sum uttan hóvasták ber til at umsita.
- at veita brekaðum sama tænastustøði, uttan mun til stovnstilknýti
- at økja endurnýtsluna til 70-80 %, sum ein samskipað útvegan gevur møguleika til.
- at geva politisku og játtandi myndugleikum amboð at stýra gongdini á hesum øki, sum er í stórari menning.

### Fíggjar- og ábyrgdarbýti

Nevndin mælir til at:

- tøknilig útgerð til brekað verður flokkað í hjálpartól, viðgerðartól, stovnstól og frálærutól
- hugtøkini "fyribils" og "varandi" verða avtikin í samband við avgerð um játtan.
  Hettar heldur umboð Almannastovunnar krevur lógarbroyting í forsorgarlógini gr. 18 stk.5, og mælir nevndin í tí føri til, at slík broyting verður framd.

Persónlig tól til einstøk

| Fíggjar ábyrgd | | Tann brekaði kann vera Heima | á sj.húsi | í skúla | á stovni |
|---|---|---|---|---|---|
| Almanna-stovan | Hjálpartól | A | A | A | A |
| Sjúkra-hús | Viðgerðar-Tól | S | S | S | S |
| Kommunur | Frálærutól | K | K | K | K |
| STovnar | Stovnstól | | ST | ST | ST |

Talvan vísir uppskotna ábyrgdarbýtið.

Vegleiðandi flokking

Við støði í altjóða skrásetingini, (ISO), hevur nevndin gjørt uppskot til vegleiðandi lista yvir viðgerðartól, sum eftir nevndarinnar tilmæli verða roknað sum sjúkrahúsábyrgd.

Uppgávurnar hjá pørtunum verða nú lýstar nærri:

## Almannastovan

Hjálpartól

Persónlig hjálpartól til einstaklingar til nýtslu í heimi, í skúla, á stovni og á sjúkrahúsi verða játtað av Almannastovuni.

Til henda bólk verða roknað hjálpartól til skúlabrúks, sum eru fortreyt fyri at næmingar, vegna sítt brek, kunnu fáa undirvísing og taka virknan lut í skúlaarbeiðinum.

Avmarking og tænastustøði

Í spurningum um flokking og tænastustøði, sum hava fyridømiseyðkenni (prinsippkarakter), ráðførir Almannastovan seg við eitt tilnevnt umboð fyri sjúkrahúsverkið, skúlaverkið ella HTM, eftir hvat spurningurin nú snýr seg um.

## Hjálpartólamiðstøðin

HTM átekur sær at útflýggja og skipa endurnýtslu av øllum hjálpartólum.

Samstarv við sjúkrahúsini

HTM skal reka eina hóskandi goymslu av hjálpartólum á hvørjum sjúkrahúsi og skráseta útlán. Tólini verða innafturlatin á HTM ella á sjúkrahúsgoymsluna.

HTM merkir og skrásetir øll hjálpartól í landinum í teldukervið, sum er ment til goymslu og útlánsstýring.

Útflýggingarheimild til HTM

Almannastovan er sinnað, at gera játtanarmannagongdina smidligari og burturbeina dupultarbeiði, at veita HTM eina víða útflýggingarheimild.

Almannastovan treytar sær í hesum føri eftirlit/ grannskoðan við grundarlagnum undir útflýggjanum og fer at seta krøv til mannagongd og skrásetingar.

HTM kann eisini átaka sær skrásetingina av útlánunum av viðgerðartólunum fyri sjúkrahúsini.

## Sjúkrahús

Goymsla og umsiting

Hvørt sjúkrahús sær, finnur hóskandi høli til eina goymslu og tilnevna ein ábyrgdarpersón at umsita útlán av hjálpar- og viðgerðartólum. Sjúkrahúsini siga, at talan er bert um umskipan av verandi virksemi og krevur hettar ikki eyka størv.

Viðgerðartól

Viðgerðartól til nýtslu á sjúkrahúsum, stovnum ella heima verða fíggjað og umsitin av tí einstaka sjúkrahúsinum.

Hjálpartól

Hjálpartól til sjúklingar í samband við útskriving verða latin antin frá goymsluni á sjúkrahúsunum, ella frá HTM.

Tá skipanin verður sett í verk, lata sjúkrahúsini øll hjálpartól, sum ikki verða mett sum stovnstól, inn á HTM, og innganga tey síðan í samlaða goymslufæið.

## Skúlar/kommunur

Frálærutól

Frálærutól til skúlabrúks, men eisini til nýtslu heima ella á stovni, verða fíggjað eins og áður.

Eitt øki sum hevur verið í menning seinastu árini er teldur til rørslu- og samskiftisbrekað. Praksis hevur verið at skúlin fíggjar útgerð til skúlabrúks og Almannastovan fíggjar útgerð, ið krevst heima.

Skúlaverkið hevur í fleiri ár arbeitt fyri, at teldur til rørslubrekaðar skúlanæmingar verða roknað sum hjálpartól.

Nevndin, burtursæð frá umboð Almannastovunnar, mælir til, at tá teldutøkni er fortreyt fyri at næmingurin kann fáa undirvísing, og t.d. gera skrivlig avrik, tá verður at roknað sum hjálpartól á sama hátt, sum var talan um ein koyristól.

Nevndin mælir Almannastovuni og Landsstýrinum til at gera úrskurð í hesum máli. Burtursæð frá almenna málsetninginum, sum settur er fyri samskipanini eiga hesi viðurskifti at verða umhugsað:

- Ofta er talan um kostnaðarmikla útgerð, sum smáar kommunur aftra seg at fíggja.

- Øki er somikið serstakt, og mál av hesum slag eru sjáldsom. Yvirtekur Almannastovan játtanina, verður endurnýtslan hægri.

HTM hevur ávísar royndir á hesum øki, og hevur avgreitt uml. 10 mál um teldutøkni, einamest til brekaðar skúlanæmingar. HTM mennir áhaldandi vitanina og málsviðgerina á hesum øki.

Nevndin hevur viðgjørt eitt alternativ:

HTM fær heimild at leiga skúlaverkinum, helst um Landsmiðstøðina fyri undirvísingaramboð, teldutøkni og aðra tøkniútgerð til brúks í skúlanum. Hettar, tá tiltakið er at meta sum hjálpartólaloysn ella sum partur av slíkari. Talan kann eisini vera um at útbyggja ella at tillaga skipan, ið skúlin eigur frammanundan og sum er tøk.

## Stovnar

Stovnstól

Hjálpartól og teknisk útgerð til **almenna nýtslu** á stovnum verða at rokna sum innbúgv og fíggjað av stovnunum á sama hátt sum nú.

Stovnar og sjúkrahús, sum hava fakfólk til tess:

- varðveita ábyrgdina fyri málsviðgerð og uppfylging fyri tey viðskiftafólk, stovnurin varar av.

- varðveita ábyrgdina at víðlíkahalda og umvæla hjálpartólini hjá teimum klientum stovnurnin varar av.

- átaka sær smærri viðlíkahalds- og umvælingaruppgávur av hjálpartólum hjá heimabúgvandi. Hetta verður gjørt í samstarvi við HTM, sum veitir ráðgeving og eykalutir.

- HTM átekur sær, sum higartil at viðlíkahalda og menna vitanina hjá viðkomandi starvsfólkum um hjálpartól við relevantum tiltøkum.

Rundskriv til avvarðandi stovnar

Nevndin mælir landsstýrinum til, við einum hóskandi rundskrivi at gera stovnumum hesa ábyrgd greiða.

Tað er frammanundan lutfalsliga greiðar avtalur um býti av uppgávunum millum starvsfólk í heimarøktini, stovnarnar og HTM:

> Har sum starvsfólk eru, við innliti í hjálpartólaspurningar, hava hesi ábyrgdina av staðfestandi málsviðgerðini og HTM virkar ráðgevandi, letur tól til roynd og útvegar tólini, tá tey eru játtað.

Men tað ber meira og meira á tann bógv, at stovnarnir frásiga sær uppgávuna: t.d. at sjúklingar verða útskrivaðir frá sjúkrahúsum uttan neyðug hjálpartól og uttan at tørvurin av tiltøkum heima er staðfestur.

Uppskotna skipanin miðsavnar enn fleiri uppgávur á HTM, eisini uppgávur sum fyrr hava verið stovns- og sjúkrahúsuppgávur burturav.

Tí er staðfestingin av ábyrgd stovnanna fyri m.a. avgerandi, skal starvsfólkatørvurin á HTM ikki verða ónøktandi.

Hetta er eisini rationel nýtsla av tí starvsfólkatilfeingi, sum er í skipanini: Heimasjúkrasystrar, eftirlitskvinnur hjá heimahjálpini, ergo- og fysioterapeutar, sjúkrasystrar og handverkarar á sjúkrahúsum og stovnum.

Fyrimunirnir eru fleiri:

- Tørvurin verður staðfestur av fakfólkum sum kenna tann brekaða og eru um hann til dagligt.

- Tær mest vanligu umvælingar verða gjørdar lokalt. Hetta sparir tíð og farmaflutning og er bíligari enn at teknikarin á HTM t.d. skal til Suðuroyar, Klaksvíkar ella í Vágarnar at lappa hjóli á einum koyristóli ella smyrja eina song.

# Avleiðingar av samskipanini

Hjálpartól

**Útveganin komandi árini**
Við støði í donskum og norskum hagtølum, hagtølum frá HTM og Almannastovuni og við atliti til uppskotnu skipanina, hevur nevndin gjørt eina forsøgn. Talan er um hjálpartól játtað eftir forsorgarlógini og umsitin av HTM: (í 1000 kr)




Fortreytin fyri forsøgnini er at samskipanin verður framd í 1993. Vøksturin, stavandi frá veitingunum til skúla- og sjúkrahúsverkið er settur til eina mió. kr í 1993.

Endurnýtslan, verður eftir fáum árum 70 - 80 prosent av samlaðu veitingunum, og umboðar í 1993 eitt virði uppá 4 mió. og fer í framtíðini at liggja um 5-6 mió. árliga.

Sum tað sæst, fellur útreiðslan hjá Almannastovuni til uml. 2,5 mió. - hóast virðið av játtanum fýrafaldast í mun til 1988 og er tað eisini her sum ítøkiligu sparingarnar síggjast av samskipanini.

Viðgerðartól

Tørvurin á viðgerðartólum verður mettur at umboða 5 og í mesta lagið 10 % av samlaðu nýtsluni av hjálpartólum.

Sjúkrahúsini sleppa heilt undan íløgum í hjálpartól til einstaklingar, men yvirtaka "afturfyri" viðgerðartólini fult og heilt.

### Umsiting á sjúkrahúsum og stovnum

Tá metast skal um avleiðingar av samskipanini fyri partarnar sum umsita skipanina, er vert at leggja tilmerkis:

Talan er ikki bert um rationalisering av verandi virksemi, men eisini um at fyrireika seg sum best at útvega tann vøkstur í veitingunum sum er væntandi.

Við teimum sparingum sum eru framdar á sjúkrahúsum, røktarstovnum og innan skúlaverkið gevur tað tí ikki meining at tala um beinleiðis sparingar her.

### Umsiting á Almannastovuni

Fyri tey tól, sum HTM fær útflýggingarheimild til, verður eitt tíðarkrevjandi lið í játtanarmannagongdini spart.

Grein 18 deildin fæst tó við so nógv onnur øki, t.d. endurbúgving og heilivág, er hart fyrispent av sparingum og bíðiðtíðin eftir játtan er fleiri mánaðir.

Grein 18 deildin tørvar orku til tey stóru málini: Umbygg-ingarnar, barnamál, bilmál o.t., so nevndin heldur ikki henda rationalisering fríger starvsfólk.

### Umsiting á HTM

Nýggj virkisøki

Uppskotna skipanin leggur nýggj virkisøki inn undir HTM at umsita:

- Tól til fyribilsnýtslu, goymsluhald á sjúkrahúsum, umsiting av útflýggingarheimild, rakstur av goymslustýringsskipan.

Økt arbeiðsmongd

Men arbeiðsmongdin økist eisini:

- Komandi árið renoverar HTM tól fyri 4 mió. kr. Nýggja tollógin krevur 1/4 ársverk og meirvirðisgjaldsskipanin er fyri framman.

1 starvsfólk og 437.000 kr.

HTM er sinnað at átaka sær hesur uppgávur, verður 1 starvsfólk sett afturat teimum 7, sum eru normerað.

Við atliti til samskipanina í 1993 hevur HTM gjørt eina fíggjarætlan uppá 3,107 mió. (hjáløgd sum skjal, síða 21)

Nevndin heldur hesa vera rímiliga við atliti til komandi virksemið.

Verandi játtan til HTM er 2,442 mió kr. Ómaksgjaldið lagt á nýggj útvegað tól verður í 1993 mett til 218.000 kr.

Soleiðis vanta 437.000 kr. til rakstur av HTM í 1993:

Nevndin hevur tí viðgjørt viðurskiftini á HTM nærri:

**Raksturin av HTM**
Raksturin av HTM verður partvíst av eini játtan (2,442 mió. í 1991) og einum ómaksgjaldi uppá 10 prosent, sum verður lagt á seld tól, sum hevur givið uml. 300.000 kr.

Hetta hevur víst seg at vera óheppið, tí við hækkandi endurnýtslu fellur ómaksgjaldið.

Nevndin hevur tað áskoðan, at tað er ikki rætt, at raksturin á HTM er tengdur at einum ómaksgjaldið fyri seld tól.

Endmálið við HTM er at útvega hjálpartól, so bíliga sum gjørligt. M.a. við at endurnýta tólini. Jú meira effektivt HTM fremur henda málsetningin, minni er til raksturin á HTM. Hetta kann ikki sigast at vera góð motivatión.

Samlaða nýtslan seinastu árini, er her samanborin við játtanina til HTM (í 1000 kr.):




Føstu útreiðslurnar, lønir og húsaleiga, eru øktar. Meðan sparingar eru framdar innan umsitingina.

Munurin millum nýtslu og játtan í 1988 og 1989 svarar til íløguna í goymsluna. (uml. 2 mió. tilsamans)

Meirnýtslan í mun til játtanin í 1990 -1992 er fíggjað av ómaksgjaldinum og, við loyvi Landsstýrisins, við sølu av tólum frá goymsluni.

# Flytan av tilfeingi

Tað er fyrr ávíst, at tað serliga er á forsorgararlógini at sparingar kunnu ávísast, so skal loysnin verða útreiðsluneutral, er tað her upphæddin kann finnast, sum tryggjar raksturin á HTM.

**Hækkað játtan til HTM**
Nevndin mælir til at játtanin til HTM verður hækkað við 655.000 í 1993 og 10%-ómaksgjaldið - eitt fyribrigdi sum elvir til umsitingartrupulleikar á HTM - verður avtikið.

Játtanin til forsorgarlógina verður skerd við somu upphædd.

Í hesum føri verður bert nettokostnaðurin av hjálpartólunum bókaður á forsorgarlógina. Hetta er fakturavirði, tollur og farmur. Tær óbeinleiðis útreiðslurnar - sum ein privat fyritøka hevði lagt omaná kostnaðin, umframt ein vinning - verða fíggjaðar yvir fíggjarløgtingslógina.

Forsøgnin á síðu 11, er her nýtt sum grundarlag at lýsa avleiðingarnar av hesari loysn: (í 1000 kr.)




Verða tølini fyri 1991 samanborðin við forsøgninga 1993, so er talan um beinleiðis sparing uppá 848.000 kr. á forsorgarlógini og í 1996 uppá 1.303.000 kr.

Tað eru viðurskifti sum kunnu ávirka hesa forsøgn:

- Nýggj tøknifrøði, sum myndugleikar góðkenna sum hjálpartól verða latin frá HTM.
- Hjálpartól, sum nú verða bókað á ymiskum konti á undir grein 18, á Almannastovuni, verða latin HTM at umsita - og sostatt koma at framstanda, sum hjálpartól latin frá HTM. Tól til hoyribrekað kundu verið eitt dømi.
- Tað hevur víst seg at Almannastovan og HTM ikki bókað allar rokningar fyri seld tól frá HTM á sama fíggjarár. Hetta kann geva ein mun uppá nakrar hundrað túsund krónur.

## Bygnaður

Ábendingar eru komnar frá Landsstýrinum, at HTM í framtíðini ikki skal vísa beinleiðis til Almanna- og heilsudeildina, men skal leggjast undir eitt av fakverkunum.

Bæði Almannastovan og Sjúkrahúsverkið eru áhugað at integrera HTM í sín struktur, og hava greitt nærri frá hesum í skrivum, sum eru hjáløgd sum skjøl.

**HTM undir Sjúkrahúsverkið**
Sjúkrahúsverkið sær tað sum ein fyrimun at kunnu leggja HTM til verandi viðgerðartilboð. Í royndini at stytta innleggingartíðina og viðgera fólk í egnum heimi, eru hjálpartól ofta ein fortreyt. Tætt tilknýti til sjúkrahúsið kundi tryggja liðiligari samstarv í samband við útskriving.

**HTM undir Almannastovuna**
Almannastovnan heldur prinsipielt at HTM eigur at verða ein stovnur í primeru almannatænastuni, serliga nú, Almannastovan verður at kalla einakeypari av veitingunum frá HTM.

Almannastovan vil fegin, at HTM Almannastovunnar vegna, framyvir tekur avgerð um játtan av ávísum hjálpartólum, definerað við prísi og/ella hjálpartólaslagi.

Treytin fyri hesari delegatión er tó, at HTM fer inn eina skipan, har stovnurin verður stovnur í Almannaverkinum.

Almannastovan leggur dent á, at HTM verður skipað sum ein sjálvstøðugur stovnur, við víðari kompetencu, áraka bygnaðinum fyri heimahjálparaskipanina.

**HTM sjónarmið**
Á HTM verður ikki hildið, at verandi bygnaður, har HTM er stovnur undir Landsstýrinum, er nøkur forðing fyri, at ítøkiligu tiltøkini um samskipan og rationalisering kunnu setast í verk 1.januar 1993.

Teir fyrimunir sum vera nevndir, antin HTM verður stovnur undir Almannastovani ella deild á Landssjúkrahúsinum, fáast eins væl við samstarvsaftalum, sum lýst í álitinum og eini reglugerð, sum staðfestir uppgávurnar.

HTM veitir bæða almanna-, heilsu- og skúlaverkinum tænastur. Óhefta støðan við verandi bygnaði hesi fyrstu 5 árini, hevur gjørt tað lætt at arbeitt tvørturum sektormørk og stimbrað eldhugan hjá starvsfólkunum á HTM at uppbyggja eina rationella og vælvirkandi eind.

Tí verður mælt til at varðveita verandi bygnað, meðan samskipan verða framd, og síðan taka støðu til møguliga bygnaðarbroyting við atliti til tær royndir, sum tá fyriliggja.

Ein endurskoðan av bygnaðinum kundi hóskandi verið gjørd í 1996, tá leigusáttmálin í verandi hølum gongur út.

# Tíðarætlan

Samskipanin kann fremjast 1. januar 1993, um hesar uppgávur verða loystar og tíðarfreistirnar hildnar:

<table>
<tr><th></th><th colspan="4">1992</th><th colspan="8">1993</th></tr>
<tr><th></th><th>9</th><th>10</th><th>11</th><th>12</th><th>1</th><th>2</th><th>3</th><th>4</th><th>5</th><th>6</th><th>7</th><th>8</th></tr>
<tr><td>Nevndin letur landsstýrinum álitið</td><td></td><td>X</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Landsstýrið viðtekur samskipanaruppskotið</td><td></td><td></td><td>X</td><td>X</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>FL sendir rundskriv um ábyrgdarbýti 1993</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td>X</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Almannastovan og HTM avtala játtanar-delegering og krøv til hagtøl</td><td></td><td></td><td></td><td>X</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Goymslan á HTM skrásett á teldunum</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td colspan="3">|————|</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Málsviðg. & teknikara-skeið á HTM</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td colspan="2">|———></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Sjúkrahúsini ávísa goymsluhøli og tilnevna ein ábyrgdarpersón</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td>X</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Sjúkrahúsini lata síni tól skráseta á HTM</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td colspan="2">|——|</td><td></td><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Samskipanin verður framd</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td colspan="4">-----------</td><td colspan="4">|—————————></td></tr>
</table>

Nevndin mælir til at HTM fær ábyrgdina av at skipa samstarvið millum stovnarnar og taka neyðug stig til at tíðarætlanin verður hildin og uppgávurnar loystar.

# Skjøl


| | |
|---|---|
| Bókmentir | 19 |
| Viðgerðar- og hjálpartól | 20 |
| Fíggjarætlan fyri HTM | 21 |
| Setningurin hjá nevndini | 22 |
| Viðmerkingar Almannastovunnar | 23 |
| Viðmerkingar Sjúkrahúsverksins | 25 |

# Bókmentir

Í yvirlitinum er tað tikið við sum er beinleiðis brúkt í álitinum ella sum nevndin heldur hevur verið viðkomandi fyri arbeiðið. Rithøvundarnir eru ikki nevndir. Tilfarið er til taks á HTM:

Úr Føroyum

**Hjálpartólamiðstøðin**
- Álit um hjálpartólamiðstøð - 1987
- Teldutøkni og brek - 1989
- Telduskipan á HTM -1989
- Hagtøl vyri virksemi 1988 -1990
- Fíggjarætlanir/roknskapir 1988 - 1992

**Landsskúlafyrisitingin**
- Yvirlýsing um teldutøkni, samtykt á EF-ráðstevnu
- Frágreiðing eftir kanningarferð

**Almannastovan**
- Hagtøl frá grein 18, 1988-91

Úr Danmark

**Dansk hjælpemiddel Institut**
- Genbrug af hjælpemidler for handicappede og ældre - 1983

**Ringkøbing Amts hjælpemiddelcentral**
- Statistik over genbrug 1980 - 1991

**Socialministeriet**
- Rapport fra Arbejdsgruppen vedr. hjælpemidler og behandlingsredskaber -1985

Úr Noreg

**Rådet for Tekniske tiltak for funksionshemmede**
- Vekst og variasjon i folketrygdens utgifter til tekniske hjelpemidler. - 1990
- Tekniske hjelpemidler ved udskriving fra sykehus. - 1989
- Evaluering av leieordningen for skolehjelpemidler - 1990
- HMS felles EDB-System - 1989
- Lokal finansiering / lokal organisering av tekniske hjelpemidler til funksjonshemmede - 1990

**Direktoratet for forvaltningsudvikling/Statskonsult**
- Hjelpemidler til funksjonshemmede - 1990

Úr Svøríki

**Socialdepartementet**
- Hjälpmedelsverksamhetens utveckling, kartläggning och bedömning

# Viðgerðar- og hjálpartól

Yvirlitið er uppskot frá nevndini hvat í framtíðini skal roknast sum viðgerðartól (sjúkrahúsábyrgd) ávikavist hjálpartól (Almannastovu-/HTMábyrgd). Bert tól, sum royndirnar vísa, ivi er um, eru tikin við.

**Hjálpartól**

| ISO nr | Lýsing |
|---|---|
| 033303 | Tryksårsforebyggende puder |
| 033306 | Madrasser og liggeunderlag |
| 034803 | Trænings- og ergometercykler<br>HTM umsitur hettar nú ! |
| 034806 | Ståbarrer og ståstøtter |
| 034815 | Arm-, krop- og bentræningsredskaber<br>Ribbir, gymnastikmáttir, balancubrettir |
| 035103 | Inkontinensalarmer<br>Hettar hevur HTM nú ! |
| 092709 | Urinkolber<br>Hvør hevur kolbustativ |
| 092715 | Fastgøringsanordninger |

**Viðgerðartól**

| ISO nr | Lýsing |
|---|---|
| 030306 | Inhalatorer |
| 030318 | Iltapparater |
| 030321 | Slimsugere |
| 030327 | Respirationsmuskeltrænere<br>HTM hevur latið nøkur C-pap system, men halda ikki tað verða forsvarligt |
| 030606 | Støttestrømper<br>Alma/SIRI til heimabúgvandi |
| 030609 | Kompressionsstrømper<br>Alma/Siri til heimabúgvandi |
| 030903 | UVA-lyslamper |
| 030906 | UVB-lyslamper |
| 030909 | Beskyttelsesbriller til lysbehand. |
| 032121 | Infusionspumper |
| 032706 | Stimulatorer til smertelindring |
| 034824 | Biofeedback udstyr |
| 150930 | Sonder |

# Fíggjarætlan fyri HTM - 1993

| Rakstrarstað 12012 Hjálpartólamiðstøðin | Nýtsla 1991 | Játtan 1992 | Ætlan 1993 |
|---|---|---|---|
| 103143 Løn - starvsfólk | 818 | 852 | 1080 |
| 103151 Løn - avloysarar | | 100 | 0 |
| 103168 Løn - sáttmálalønt | 904 | 835 | 863 |
| 103176 Løn - frítíðarlønt | 15 | 30 | 0 |
| 103222 Løn - reingerð | 27 | | 0 |
| 103405 Løn - úrtíðarløn | | | |
| arbeiðsgevaragjøld | | 13 | 51 |
| LØNIR ÍALT | 1764 | 1830 | 1994 |
| 213105 El, hiti og vask | 49 | | 60 |
| 213806 Leiguútreiðslur | 668 | | 690 |
| HUS Í ALT | 717 | 709 | 750 |
| 113202 Ferða/dagp. innanl | 14 | | 20 |
| 123103 Skeið | 99 | | 60 |
| 123169 Ekstern undirvís. | | | |
| 203308 Lýsingar | 3 | | 5 |
| 213702 Ognartrygging | | | |
| 233051 Innbúgv | 27 | | |
| 233155 Prentlutir | | | |
| 233259 Postgjald | 6 | | 8 |
| 233354 Telefon og telex | 69 | | 70 |
| 233504 Sakkøn hjálp | | | |
| 233561 Aðrar skriv.útr. | 38 | | 40 |
| 253928 Tæ.akfør raks. vm. | 73 | | 80 |
| 303658 Amboð og maskinur | 6 | | |
| UMSITING ÍALT | 335 | 257 | 283 |
| 233553 Keyp | 89 | | 40 |
| 233703 tól/leiga | | | |
| 233711 forrit keyp/leiga | | | |
| 233728 Serkøn hjálp | 9 | | 0 |
| 233744 Aðrar útr. | | | |
| 233752 Nýgerðir forrit | | | 30 |
| 233777 Rakstrarkost. | 11 | | 10 |
| 123136 Skeið | | | |
| EDV ÍALT | 109 | 45 | 80 |
| 303666 Tilfar og eykalut. | 17 | | |
| 303699 Keyp hj.tól innanl | 247 | | |
| 303704 Keyp hj.tól uttanl | 1764 | | |
| 303712 Tollur | 575 | | |
| 303729 Farmur uttanlanda | 73 | | |
| 303737 Farmur innanlanda | 73 | | |
| ÚTR. HJÁLPARTÓL ÍALT | 2749 | 0 | 2400 |
| 83116 Hjálpartól privat | 78 | | |
| 83124 Hj.tól gr.18 Alma. | 3033 | | 2400 |
| 83132 Hj.tól alm.stovnar | 121 | | |
| 83904 Aðrar inntøkur | | | |
| INNT. HJ.TÓL ÍALT | 3232 | 399 | 2400 |
| Ómaksløn v.m | 483 | 399 | 0 |
| JÁTTAN | 2442 | 2442 | 3107 |
| NÝTSLA | 2925 | 2841 | 3107 |

# Setningurin

90-8203.0325

HTM: ____

**FØROYA LANDSSTÝRI**

– – MAR. 1990

Hjálpartólamiðstøðin

FR-110 Tórshavn. 20. marts 1990

Tlf. 11080 . Telex 81318 Lldgov fa . Telefax 14942 . Postbox 64
Ábyrgdartíð: Kl. 10–15, leygardag stongt

F. L. j. nr. (at tilskila í svari) 901-20-7

KlH/pp

Landsstýrið hevur gjørt av at seta nevnd, sum skal gera tilmæli um, í hvønn mun játtanin, útveganin og endurnýtslan av hjálpartólum til brekað, eigur at samskipast millum heilsu-, almanna- og skúlaverkið. Uppskot um broytingar av verandi skipan skulu fevna um hesi viðurskifti:

raðfesting av uppskotnum broytingum
meting av fíggjarligu avleiðingum og krøv til flyting av tilfeingi millum "verk" og stovnar
krøv til broytingar í mannagongd og lógum.

Nevndin letur landsstýrinum tilmælið í seinasta lagi 1. juni 1990, so avleiðingar kunnu innarbeiðast í fíggjarætlaninar fyri 1991.

Nevndin hevur hesar limir:

Dánjal Pauli Haraldsen, leiðari á Hjálpartólamiðstøðini, formaður
eitt umboð fyri Almannastovan, sum Almannastovan tilnevnir
eitt umboð fyri Sjúkrahúsverkið, sum Sjúkrahússtjórin tilnevnir
eitt umboð fyri Landsskúlafyrisitingina, sum Landsskúlafyrisitingin tilnevndir.

Skrivaraarbeiðið fyri nevndina verður útint av Hjálpartólamiðstøðini. Samsýning verður ikki latin fyri nevndar- og skrivaraarbeiðið.

Almannastovan, Sjúkrahússtjórin og Landsskúlafyrisitingin geva beinleiðis boð til formannin, um hvønn tey tilnevna sum lim.

Tey fáa beinleiðis boð um hetta skriv.

Løgmaður

Klaus Hermann

## Viðmæli Almannastovunnar viðvíkjandi Hjálpartólamiðstøðini

**Heimild Almannastovunnar:** Við gildi frá 01.01.1988 var tátturin um "helbredsforanstaltninger" strikaður í galdandi avlamispensjónslóg. Við samsvarandi innihaldi, sum í omanfyrinevnda. í tátti, kom nýggj grein í galdandi forsorgarlóg, nevniliga § 18.

**Endamál:** Frá nevnda degi er tað Almannastovan, ið tekur avgerð um, hvørji tiltøk skulu setast í verk viðvíkjandi endurbúgving, arbeiðstólum, sjálvstøðugari vinnu, arbeiðsfremjandi lønum ella stuðuli, hjálpitólum og onnur tiltøk, ið hava til endamáls at hjálpa fólki við varandi breki komin av sjúku ella elli við tí fyri eyga at

1. at gera tað møguligt hjá tí brekaða at vera í vinnu
2. at minka um fylgjurnar av brekinum
3. at lætta um dagligu tilveruna hjá tí brekaða

Í galdandi **fólkapensjónslóg § 14, 2. stk.** hevur Almannastovan m.a. heimild til:

1. at veita stuðul til broytingar í heiminum, so tað verður betur egnað til hin brekaða pensjónistin
2. og neyðug hjálpartól

**Amboð í sosiala arbeiðinum við heimabúgvandi brekaðum:** Omanfyri nevndu heimildir, § 18 í forsorgarlógini og § 14 í fólkapensjónslógini saman við heimildini í § 32 í forsorgarlógini at veita heimahjálp, eru høvuðsamboðini hjá Almannastovuni at veita heimabúgvandi brekað hjálp, so tey framhaldandi kunna búgva heima, at tey framhaldandi kunnu verða í vinnu og at minka um fylgirnar av brekinum, t.d. við hjálpartólum.

**Víðkað í ávísan mun at galda fyri fólk á almennum døgnstovnum:** Við skrivi dagf. 13.12.1989 hevur almannastjórin boðað frá, at umframt heimabúgvandi brekað, kunnu einstaklingar, ið búgva á døgnstovnum innan almannaverkið játtast persónliga tillagaði kostnaðarmikil hjálpartól, sum ikki kunnu metast at verða náttúrligur partur av tí útgerð, sum stovnurin eigur at hava.

**Fyribils hjálpartól við útskriving frá sjúkrahúsum:** Umframt hjálpartól til heimabúgvandi brekað og einstaklingar við serligum tørvi á almennum døgnstovnum, hevur Almannastovan góðkent, at hjálpartól í ávísan mun hava verið lánt út frá Hjálpartólamiðstøðini, har tað enn ikki hevur verið greitt, um talan var um varandi brek. Lógarheimildin er ivingarsom.
Í flestu førum hevur tað tó seinni verið góðkent sum hjálpartól til fólk við varandi breki, annars er hjálpartólið heintað inn aftur til H.T.M.

**Fígging av HTM:** Hjálpartólamiðstøðin verður lutvís fíggjað við játtan á fíggjarlógini (fyri 1992 umleið 2,5 mill.kr.) og lutvís við sølu av hjálpartólum (umleið 3 mill.kr. í 1991)
Kostnaðurin av hjápartólum verður roknaður sambært upplýsingum frá HTM, soleiðis at 10% verður lagt omaná verunliga kostnaðin til keypsprís, farmagjald, toll, avgjald v.m. Hetta gevur sum er kr. 300.000 til rakstur.
Almannastovan er við sínum játtanum avtakari av nærum 100% av virkseminum hjá H.T.M.
Tað er fatan Almannastovunnar, at tænastan til brekaðu borgararnar viðvíkjandi hjálpartólum, ráðgeving í samband við broytingar í heiminum og í samband við flutningstól er hækkað síðani H.T.M. fór til verka.

**Tænastan hækkað:** Tað er somuleiðis fatan Almannastovunnar, at endurnýtslan av hjálpartólum innan almannaverkið, játtað til einstaklingar sum lán, er nýtt í so stóran mun sum til ber.

**Tilfeingi og yvirskotsorka: Bygnaðarbroyting** Tað er eisini fatan Almannastovunnar, at hvat viðvíkur høli, tekniskari útgerð og serkunnleika, er H.T.M. væl fyri og kundi, um bygnaðarbroyting fór fram, kunna átikið sær uppgávur eftir nærri fyriskipan, sum Almannastovan í dag tekur sær av.

**Fl. av uppgávum:** Talan er um játtan av ávisum kendum hjálpartólum, undir eitt ávíst kostnaðarstøði. Sum er, er talan um dupult arbeiði, av tí at Almannastovan skal taka støðu til hvønn smálut, við haravfylgjandi málsviðgerð, støðutakan, avgreiðslu og ávísing.

**Samskipað teldukervið:**

**Konteringsspurningur:** Tað er fatan Almannastovunnar, at fyrimunur hevði verið, um H.T.M. og sjúkrahúsini høvdu felags teldukerv viðvíkjandi hjálpartólum, og at H.T.M. eigur at átaka sær uppgávur at finna út av, hvør skal gjalda eitt hjálpartól, sum verður útflýggjað við útskriving frá sjúkrahúsunum. T.d., at um brúk var fyri hjálpartóli í meira enn eitt ár, so skal Almannastovan játta, annars sjúkrahúsverkið.

**Lógarbroyting:** Annar spurningur er, um arbeitt átti at verið við broyting í forsorgarlógini, soleiðis at kommunulæknar eisini kundu ávíst hjálpartól til fyribilsnýtslu.

**Hjálpartól til undirvísingarbrúk til heimaarbeiði:** Almannastovan heldur seg ikki hava trupult við at útgreina hvørji hjálpartól til undirvísingarbrúk í heiminum, hon skal taka støðu til. Talan er aloftast um samskiftisbrek, har næmingurin hevur brúk fyri hjálpartóli fyri at kunna gera sítt heimaarbeiði og harvið minka um fylgirnar av brekinum.
Almannastovan heldur tó, at tað er umráðandi, at landsstovnur innan skúlaverkið fíggjar samskiftisfrálærutólið í skúlanum, so tað ikki verður avgerandi, hvussu stór kommunan er, um næmingur fær hjálp.

<u>Tilmæli Almannastovunnar</u>:

1. Landsstýrið eigur beinanvegin at taka støðu til, um Hjálpartólamiðstøðin skal vera deild undir Sjúkrahúsverk Føroya ella almannaverkinum.

2. Kemur landsstýrið til ta niðurstøðu, at H.T.M. er náttúrligur partur av tí tænastu almannaverkinum er álagt, sambært galdandi lógir og fyriskipanir, at veita brekaðum einstaklingum, so eigur samstundis at verða tikin støða til reglugerðina, sum Almannastovan skjýtir upp verður galdandi, nevniliga at H.T.M. verður deild av Almannastovuni á hædd við Heimahjálparskipanina við sjálvstøðugum rakstrarstaði.
At H.T.M. innan nærri ásettar karmar útinnur ein part av tí arbeiði, ið nú verður gjørt á Almannastovuni.
Tað er Almannastovan, ið nærum í 100% brúkar H.T.M., og H.T.M. er partur av teimum ymsu møguleikunum Almannastovan hevur at veita borgaranum hjálp.

3. Landsstýrið eigur at taka støðu til, hvussu HTM skal fíggjast framyvir. Sum er, er flyting farin fram við landsstýrisins góðkenning, soleiðis at telduútgerð og teldumenning er framd við at selja út av tólum av lagrinum hjá H.T.M.
Somuleiðis verður raksturin lutvís fíggjaður við at leggja avgjald á søluna av hjálpartólum.
Almannastovan skal tilmæla, at raksturin verður hildin fyri seg, sum sjálvstøðug játtan. Veitingarnar sambært almannalóggávuni fyri seg.
Um hetta ikki verður gjørt, er vandi fyri at áhugin fyri at selja hjálpartól verður stýrdur av áhuganum at fáa rúmari ræsur til rakstur, og myndin verður sløðrað.

<u>Viðmæli Almannastovunnar er</u>, at teldukervini á H.T.M. og sjúkrahúsum verða samskipað, og at H.T.M. átekur sær at halda greiðu á, nær tað er sjúkrahúsútreiðsla og nær, ið neyðugt er við játtan frá Almannastovuni.

ALMANNASTOVAN, hin 2. oktober 1992

Marjun Sigurðsdóttir
deildarstjóri/em

S J Ú K R A H Ú S S T J Ó R I N

S. j. nr. 14-92.02-6
(at tilskila í svari)

Dánjal Pauli Haraldsen, leiðari
Hjálpartólamiðstøðin
Postsmoga 1049
110 Tórshavn

Tórshavn 1. oktober 1992

Heitt hevur verið á sjúkrahúsverkið um at gera ummæli til álitið um útvegan og endurnýtslu av hjálpitólum, sum ein nevnd, sett av landstýrinum, við umboði frá Hjálpartólamiðstøðini, Almannastovuni, Sjúkrahúsverkinum og Landsskúlafyristingini hevur latið úr hondum í juni 1992.

Á síðu 16 í álitinum stendur: "Ábendingar eru komnar frá Landsstýrinum at HTM í framtíðini ikki skal vísa beinleiðis til Almanna- og heilsudeildina, men skal leggjast undir eitt av fakverkununum. Bæði Almannastovan og Sjúkrahúsverkið eru áhugað at integrera HTM í sín struktur." Við tað, at álitið ikki nevnir grundir sjúkrahúsverksins fyri at integrera HTM í Sjúkrahúsverkið, skal verða nomið við grundirnar her, og síðani verða gjørdar viðmerkingar til sjálvt álitið.

Tað, ið vit rópa hjálpitól, í hesum sambandi, eru tól, ið eru ætlað at bøta um eitthvørt heilsubrek, veri tað seg viðføtt, av sjúku ella av elli.

Summi av hesum tólum eru at rokna sum hjálp í viðgerðini, t.e. tól, ið at veita heilsubót. Hetta eru viðgerðatólini, ið sjálvsagt verða serliga nógv nýtt í sjúkrahúsverkinum og av kommunulæknum og tannlæknum.

Ein annar partur av hjálpitólunum er ikki ætlaður til viðgerð av einstaklingumr, men til at verða teimum ein hjálp at bøta um brekið, fyribils ella varðandi, t.d. fyribilsstavurin til tann beinbrotna ella stavurin til varðandi nýtslu til tann gamla, ið er vorðin ótryggur á beinunum.

Tað eru vanliga heilsuverksstarvsfólk, ið saman við tí brekaða koma ásamt um ein hjálpartólatørv.

Tá tað snýr seg um viðgerðartól og hjálpartól til fyribilsnýtslu, verða tey latin beinleiðis av sjúkrahúsgoymslunum, men

Postrúm 366.
Sigmundargøta 5.
110 Tórshavn.
Tlf. 15360. Fax.18265

er talan um varðandi hjálpitól, verður søkt til Almannastovuna, ið kann veita hjálpitólið smbrt. § 18 í forsorgarlógini. Sum vituligt er, er ofta ilt at avgera nær talan er um fyribils ella varðandi hjálpitól. Tí gongur tað ofta soleiðis, at sjúklingur fær eitt hjálpitól á sjúkrahúsinum, har hann varð viðgjørdur, sum hjálpir honum væl og tí eigur at hava til varðandi nýtslu. Í verðandi skipan skal hann tó lata sjúkarhúsinum fyribils-hjálpitólið aftur og søkja Almannastovuna um sama hjálpitól, sum HTM so útflýggjar. Hetta kann tykjast fólki óneyðuga tung manna-gongd.

Við tað, at flestu hjálpitól kunnu nýtast aftur og vit longu nú hava ognað okkum so nógv hjálpitól í Føroyum, kann væntast at útreiðslur til nýkeyp av hjálpitólum fara at verða rættuliga avmarkaðar í komandi árum. Neyðugt verður tó altíð við ávísum nýkeypi, ikki minst vegna teknilogisku menningina.

Fortreytirnar fyri at skipa fyri skilagóðum hjálpitólaveitingum eru sostatt:

1. Starvsfólk, ið kunnu meta um heilsubrek og hvussu bót ella bati kann veitast t.e. vanliga læknar, sjúkrasystrar og terapeutar.

2. Starvsfólk, ið hava serligan kunnleika til hjálpitól, t.e. vanliga ergoterapeutar og fysioterapeutar, ið hava víst hesum umráði serligan áhuga.

3. Goymsluhølir og teldugrundaðar goymslustýriskipanir.

4. Verkstaðir og teknikarar.

5. Peningur til nýkeyp.

Ad 1:

Í sjúkrahúsverkinum eru í dag allar tær heilsustarvsgrein-ir, ið kunnu koma uppá tal. Harumframt eru vanliga neyðug-ir upplýsingar longu til skjals í sjúklingajournalunum. Ergo- og fysioterapeutarnir á Hjálpartólamiðstøðini, við teirra servitan, høvdu kunna samstarvað lættari og í størri mun við starvsfelagar sínar í sjúkrahúsverkinum, um teir vóru settir á hjálpartóladeildini á Landssjúkrahúsin-um. Samskiftið við tey sjúkuavgerandi og sjúkuviðgerandi kundi farið fram púra óbureukratist. Møguleiki hevði har-umframt verið fyri jobrotatión eftir sínámillum avtalum, millum ergoterapideildina, fysioterapideildina og hjálpar-tóladeildina.

Ad 3:

Landssjúkrahúsið hevur í dag eina vælvirkandi innkeyps- og goymsluskipan. Goymslan hevur drúgvar royndir í samstarv-inum við útlendskar leverandørar og letur eitt sera stórt tal av ymsum vørum, ikki bert til Landssjúkrahúsið, men

til hini sjúkrahúsini, Almannastovuna, primersektorin og einstaklingar. Sum er, hevur goymslan átikið sær alla skráseting av út- og innlánum av hjálpitólum á Landssjúkrahúsinum. Samstarv við tey innkeypskønu á HTM hevði óivað verið báðum pørtum at gagni.

Ad 4:

Sjúkrahúsverkið hevur umfatandi medico-tekniskt virksemi og umvælir í dag hópin av hjálpitólum.

Ad 5:

Tann neyðugi peningurin til nýkeyp av tólum kann fáast tilvega, sum í dag, við heimild í forsorgarlógini og yvir raksturin á sjúkrahúsunum. Dømi um hetta eru longu virkandi skipanir, har goymslan á Landssjúkrahúsinum letur sukursjúkusjúklingum hjálpartól, ið Almannstovan rindar.

Sjúkrahúsverkið skal tí skjóta upp, at Hjálpartólamiðstøðin gerst ein partur av sjúkrahúsverkinum, sum hon upprunaliga var.

Fyrimunirnir eru, at starvsfólkasergreinirnar á Hjálpartólamiðstøðini allar hava starvsfelagar í sjúkrahúsverkinum, at sjúkrahúsverkið á 3 støðum í Føroyum ræður yvir hølum og funktiónum, ið kunnu minka útreiðslurnar, ið HTM nú hevur til húsaleigu, umsiting og EDV munandi og at Hjálpartólamiðstøðin lættari hevði fingið relevant avgerðargrundarlag í einsataklingamálum.

**Viðmerkingar til sjálvt álitið:**

Á síðu 3 stendur at sjúkrahúslógin sigur nakað um ábyrgd og skyldur á hjálpitólaøkinum. Tað er ikki beint tí lógin og reglugerðin fyri sjúkrahúsverkið sigur bert at sjúklingar skulu viðgerðast ókeypis.

Á síðu 5 stendur: "Sjúkrahúsini hava ikki, í nóg stóran mun, skipað innkeyps- goymslu- og viðlíkahaldsvirksemi. Úrslitið er, at sjúkrahúsini ikki hava rætta tólið at lata sjúklingum, tá ið teir verða útskrivaðir." Tað er ikki beint, at hesi viðurskiftini ikki eru skipaði í sjúkrahúsverkinum. Innkeyps-, goymslu- og viðlíkahaldsvirksemi er vælskipað, men sjúkrahúsverkið hevur av peningaligum grundum ikki sett seg føran fyri at keypa inn eitt so stórt úrval av tólum, at tað beinanvegin kann nøkta ein og hvønn tørv. Tað hevði bundið ov nógvan pening.

Niðast á síðu 5 stendur: "Sjúkrahúsini ásanna, at Almannastovan og HTM í stóran mun átaka sær veitingar av útreiðslum, sum formliga er ábyrgd sjúkrahúsverksins." Hetta er ikki beint. Sjúkrahúsverkið heldur seg átaka sær tær veitingar og útreiðslur, sum formliga eru ábyrgd sjúkrahúsverksins. Nakað annað er, at ikki er altíð lætt at vita nær eitt hjálpitól er til varðandi nýtslu

og nær tað er fyribils. Tað ber tó til at velja eitt tíðarmark, t.d. 1 ár. Tað er vert at merkja sær, at hetta bert er ein spurningur um kontering.

Á síðu 6 stendur í niðurstøðuni: "Núverandi skipan og fíggjarliga ábyrgdarbíti eru í gerandisdegnum, at kalla ógjørligt at umsita." Sjúkrahúsverkið metir ikki, at hetta er rætt. Fysioterapideildin á Landssjúkrahúsinum er sera glað fyri tað góða samstarvið, sum hon í dag hevur við HTM, og hevur saman við felagsgoymsluni gjørt uppskot, hvussu ein telduskipan millum HTM og felagsgoymsluna kundi virkað.

Á síðu 8 stendur: "HTM mennirnir og teldukervið við goymslu- og útlánsstýring og átekur sær at merkja og skráseta øll hjálpitól í landinum." Sum omanfyrinevnt hevur Landssjúkrahúsið longu mennt sítt keldukervið til goymslu- og útlánsstýring, og tí skal verða ávarað ímóti óneyðugum íløgum á dhesum øki.

Á síðu 10 stendur: "Men tað ber meir og meir á tann bógv, at stovnarnir frásiga sær uppgávuna: T.d. at sjúklingar verða útskrivaðir frá sjúkrahúsum uttan neyðug hjálpartól og uttan at tørvurin av tiltøkum heima er staðfestur." Sjúkrahúsverkið hevur ikki frásagt sær uppgávur, men latið HTM tær uppgávur, ið mettar vórðu at vera í tráð við tað, HTM eigur at taka sær av.

Á síðu 13 vísir stabbamynd, at útreiðslur hjá HTM til EDV, umsiting og húsaleigu er ein góð millón, og tá eru lønir ikki íroknaðar. Hetta kundi verðið minkað munandi um HTM gjørdist ein deild av sjúkrahúsverkinum.

Høgni Joensen

Avrit er sent:

- Føroya Landsstýri,
- Almannastovuni,
- Landsskúlafyrisitingini.